# Visti ikki, at tað var eitt anfall



**Ása Súnadóttir av Skála er ein av 400 føroyingum sum hevur epilepsi. Hon fekk sítt fyrsta anfall fyri hálvum triðja ári síðani, meðan hon gekk á Grejsdalen Efterskole í Danmark.**

SJÚKA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Henda dagin minnist hon sera væl, tí hetta var tann árligi ítróttardagurin á skúlanum – ein dagur, har næmingarnir hugnaðu sær og kappaðust hvør móti øðrum.

- Eg hevði í eina tíð ikki fingið so nógvan svøvn, og eg hevði hvørki etið ella drukkið áðrenn ítróttardagurin byrjaði.

Fyri hini var hetta eingin trupulleiki, men fyri Ásu skuldi hetta kortini vísa seg at fáa alstóran týdning.

- Eg skuldu renna 800 metrar, og var sera spent uppá tað. Eg eri eingin atletur, men hetta var stuttligt. Eg byrjaði at renna, men eg minnist einki til at eg nakrantíð kom á mál:

- Komin um málstrikuna, fekk eg mítt fyrsta epileptiska anfall. Eg mintist einki til nakað, - ikki fyrrenn eg vaknaði aftur, og eg sá at øll hugdu eftir mær, og royndu at bera meg yvir á ein bonk, greiðir Ása frá.

- Onkur spurdi meg um eg hevði epilepsi, men eg helt at tað var snedugt, at tey skuldu spyrja um tað. Eg visti ikki eingang, hvat epilepsi var, sigur hon og smílir við tankan um, hvussu nógv hetta er broytt nú.

Fyrsta hugsanin, tá hon vaknaði á grasinum var: "Hví liggi eg her? Hvat gongur fyri seg?"

- Vit hildu at eg var svímað, tí eg ikki hevði drukkið nakað, men tá eg 8 dagar seinni fekk eitt anfall aftrat, bleiv eg send til kanningar á Vejle sygehus. Her minnist eg, at onkur lækni nevndi møguleikan fyri einum knykli á heilanum, og tað festi eg meg sera nógv við. Tíbetur var ein lærari við mær til allar kanningarnar. Tað hjálpti nógv, tá eg jú var langt burtur frá mammu og babba.

Kanningarnar vístu í fyrstani einki, men tær hildu kortini fram í Føroyum. Her varð síðani staðfest, at Ása hevði epilepsi. Hon varð síðani sett í viðgerð við heilivági.

Í dag, hálvttriðja ár seinni, veit hon munandi meiri um epilepsi, sum summi nevna eina sjúku og onnur eina líðing.

*- Eingin orsøk er at krógva at ein hevur epilepsi, hóast tað kann tykjast ógvusligt, tá ein fær eitt anfall, sigur Ása Súnadóttir*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Hvat er epilepsi

Epilepsi er ein støða við herðindum, sum kemur orsaka av "ónormalum elektriskum útladingum" í heilanum, tað er ein hyperaktivitetur, sum kann mátastviðeinumelektroencefalografi (EEG.)- tóli

Epilepsirakarsentralnervasystemið á einum menniskja, og førir við sær, at lívsstøðan hjá hesum, sum raktur er av epilepsi, verður broytt.

Ein slík sjúka kann hava bæði fysiskar, psykiskar og sosialar fylgjur, og avmarkar identitetin, sjálvsmyndina og tann sosiala leiklutin hjá tí, sum raktur er av epilepsi.

Epilepsi ger, at tann, sum raktur er, fær anfall. Hann fær krampar, stívnar, missur tilvitskuna og dettur um. Eitt slíkt anfall varir vanliga 1-2 minuttir. Eftir at persónurin er komin yvir vøddaspenningarnar, fer kroppurin at gera rykkingar. Av tí at muðurin er saman læstur førir tann luftin og spýttið, sum er í munninum at skúm sæst renna út úr munninum. Spýttið kann vera blandað við blóði, um viðkomandi hevur bitið seg í tungu ella kjálka undir krampaherðindinum. Tá ið viðkomandi, sum fær epileptisk herðindi krampar, verða respirations musklarnir so ógvusliga samankreptir, at hann ikki fær luft og húðin, serliga í andliti, verður bleik og blá.

Aftan á eitt herðindi kann persónurin fella í óvit. Hann vaknar spakuliga, men kann vera óróligur, hallusineraður (tosa í ørviti) og veit ikki hvar hann er. Hetta kann vara í uml. 15 – 20 minuttir. Viðkomandi hevur høvuðpínu, eymar musklar í øllum kroppinum, og vil illa sova.

*(Kelda: Høvuðsuppgáva um epilepsi hjá Kristin V. Stampe, 2. P, Klaksvíkar HF-skeið, 2004)*